## Kveiki í nútímansgerðini av norðurlendska samstarvinum

**Føroyar skulu vera ein kveiki í nú tímansgerðini av norðurlendska samstarvinum, sigur Jóannes Eidesgaard. Framtíðarstøða Føroya í norðurlendska samstarvinum hevur fingið drúgva viðgerð á norðurlandaráðsfundinum í Reykjavík**

NORÐURLANDARÁÐIÐ

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Á fundi millum forsætisráðharrarnar og leiðararnar í Norðurlondum varð mánadagin gjørt av, at leggja til samstarvsráðharrarnar í Norðurlendska ráðharraráðnum at útgreina, hvørjir møguleikarnir eru fyri víðkaðari luttøku hjá teimum sjálvsstýrandi londunum í norðurlendska samstarvinum.

Grundað á semju millum Grønland, Åland og Føroyar legði løgmaður á fundinum dent á, at útgreiningin skal fevna um nútímansgerð av leiklutinum hjá sjálvstýrandi londunum - íroknað spurningin um sjálvstøðugan limaskap, so sum Føroyar ynskja.

Á fundinum gjørdu Svøríki og Finnland greitt, at tey í løtuni ikki síggja sjálvstøðugan limaskap hjá Føroyum sum ein møguleika, men tey tóku kortini undir við at geva samstarvsráðharrunum uppgávuna at útgreina møguleikarnar.

Í røðu sínari á ársfundinum í Norðurlandaráðnum segði løgmaður, at spurningurin um Føroyskan limaskap, er ein spurningur um vilja.

- Føroyar ynskja at átaka sær ein leiklut sum kveiki í nútímansgerðini av norðurlendska samstarvinum, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

# Tíðin búgvin til føroyskan limaskap



**– Heimurin er broyttur, og Føroyar eru eisini broyttar heilt nógv. Tíðin er eisini komin til at broyta Norðurlandaráðið. Ein broyting, sum gevur góðum kreftum møguleikar fyri at vera við kring borðið, har landakortið fyri nýggju Norðurlond í einum nýggjum heimi verður teknað. Har avgerðirnar um framtíðina, við stórum týdningi – serliga fyri smáu londini – verða tiknar. Hetta segði Jóannes Eidesgaard m. a. í røðu síni á Norðurlandaráðsfundinum í Reykjavík mánadagin**

NORÐURLANDARÁÐIÐ

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Hetta er ein serligur norðurlandaráðsfundur fyri Føroyar, tí okkara søk um eina nýggja støðu í norðurlendska samstarvinum hevur verið til viðgerðar á fundi í dag millum forsætisráðharrarnar og leiðararnar í Grønlandi, Álandi og Føroyum.

Hetta segði løgmaður m. a. í røðu síni á Norðurlandaráðsfundinum í Reykjavík mánadagin. Hann segði eisini beinleiðis, at Føroya ynskja at geva sjálvstýrandi økjunum javnsettan lut í norðurlendska samstarvinum við teimum rættindum og skyldum, tað krevur.

– Eitt samt løgting hevur viðtikið eitt ynski um sjálvstøðugan limaskap í norðurlendska samstarvinum. Og hetta halda vit so avgjørt, at møguleiki er fyri – væl at merkja, um vilji er til tess, segði Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður vísti á, at føroyingar trúgva upp á týdningin av norðurlendska samstarvinum, og at vit vilja eisinin lata _ og ikki bert fáa.

– Norðurlendskt samstarv er eitt týdningarmikið støði fyri uttanríkispolitikk Føroya, sum eisini skal røkka longur út í heim.

– Bæði landafrøðiliga og mentanarliga eru Føroyar eitt serstakt øki við sjálvstøðugari mentan og við víðgongdum sjálvstýri. Um hetta er valla nøkur ósemja, og tann veruleiki, at Føroyar eru í einum felagsskapi við Danmark, broytir heldur ikki hesa fatan, segði løgmaður.

– Vit vilja vera við til at taka avgerðir, at taka ábyrgd og vera við til at menna norðurlendska samstarvið og til at styrkja okkara felags samleika – ein tørvur, sum støðugt veksur í trá við, at limalond verða intigrerað í ES og í samsvari við alheimsgerðina.

Síðani vísti løgmaður á, at tað sum vit í dag uppliva í Norðurlondum, er ein altjóða favorisering av samstarvi við Russland, Baltikum og ES.

– Vit skulu ansa eftir, at tað norðurlendska samstarvið ikki »brotnar um miðjuna«, hvar vit fáa eitt serlig vestursinnað útnorðurlond og serliga eystursinnað eysturnorðurlond. Norðurlendska samstarvið treingir til eina nútímansgerð. Føroyar hava eitt sterkt ynski um at vera ein reellur viðspæalari í hesi tilgongd. Vit hava stigið inn í nýggja túsundárið, har lyklaorðini eru nýteinking, innovatión og tilpassan, segði løgmaður, sum eisini vísti á, at altjóðagerðin, sum eisini er farin fram í Norðurlondum, hevur ført til, at landamørkini kámast. Hann helt, at vit máttu hava fokus á, hvat skal til fyri at náa bestu úrslitini.

– Tað er eisini tað, sum politikkurin eigur at snúgva seg um. At tekna kort eftir skilinum og at tekna mørkini har, sum tey geva bestu úrslitini. Og politikkur í norðurlendskum samanhangi snýr seg jú um at samstarva á nøgvum økjum, fyri – í felagsskapi – at skapa ta bestu og mest effektivu menningina fyri øll Norðurlondini. og um tað er best fyri Føroyar at verða sjálvstøðugur limur í Norðurlandaráðnum, soleiðis sum løgtingið ynskir, so er tað eisini tað besta fyri nroðurlendska samstarvið, segði løgmaður.

Jóannes Eidesgaard segði eisini, at Norðurlandaráðið ikki eigur at gerast »mótsetninganna forum«.

– Tað skal jú ikki vera soleiðis, at Norðurlandaráðið er eitt stað, har vit meir ogmeira hugna okkum og koma hvør øðrum við, samstundis sum vit brúka nógva orku og styrki á heilt øðrum økjum. Vit brenna fyri,at Norðurlandaráðið skal vera eitt stað, har vit taka praktiskar politiskar avgerðir. Avgerðir, sum styrkja øll Norðurlond, segði løgmaður.

– Men vit trúgva og vóna, og vit rokna eisini við, at limalondini í Norðurlandaráðnum fokusera upp á úrslit heldur enn formalitetir. Tað verður sagt, at tey sjálvstýrandi londini eru javnsettir partar í samstarvinum. men sjálvandi eru vit ikki tað, hava vit ikki ein veruliga møguleika fyri javnsettari luttøku, segði løgmaður, sum eisini fegnaðist um, at full semja var á fundinum millum leiðararnar í sjálvstýrandi økjunum um eina samskipaðan innsats fyri hesum máli. Hann segði, at teir á fundinum heittu á forsætismálaráðharranar, at norðurlendsku samstarvsráðharrarnir taka málið upp við tí endamálið at greina allar møguleikar fyri eini nýggjari støðu fyri sjálvstýrandi økini í Norðurlondum.

– Tað eru 30 ár síðani Petrikommissiónina. Heimurin er broyttur. Og Føroyar eru eisini broyttar heilt nógv. Tíðin er eisini komin til at broyta Norðurlandaráðið. Ein broyting, sum gevur góðum kreftum møguleikar fyri at vera við kring borðið, har kortið fyri nýggju Norðurlond í einum nýggjum heimi verður teknað. Har avgerðirnar um framtíðina, við stórum týdningi – serliga fyri smáu londini – verða tiknar.

– Vit kundu í hesi tilgongd eisini latið okkum fingið íblástur frá heimsins størstu og týningarmestu organisatiónum – WTO – organisatiónini, sum er tað politiska og rættarliga grundarlagið fyri alheimsgerðini – har tey á ein pragmatiskan hátt, bæði politiskt og løgfrøðiliga, har latið upp fyri, at eisini ikki-sjálvstøðug lond og øki kunnu fáa sjálvstøðugan limaskap, segði løgmaður, sum endaði røðuna við at siga:

– Tíðin er búgvin til at hugsa nýtt! Til at hugsa stórt! Og til at hugsa langt!

# Eitt styrkt Útnorður styrkir Norðurlandaráðið

**– Eg haldi, at tað ikki er rímuligt, at vit, sum búgva í Útnorði, og sum eru politikarar í Útnorði, lena okkum aftur, meðan við passivt bíða eftir, at aðrir ráðharrar í Norðurlondum skulu koma við hugskotum um, hvussu tað skal samstarvast í Útnorði og við Útnorður, segði Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í norðurlandamálum í røðu síni á norðurlandaráðsfundinum í Reykjavík týsdagin**

NORÐURLANDARÁÐSFUNDUR



Ved denne lejlighed hvor hele det nordiske samarbejdsapparat er samlet her i Reykjavik, vil jeg benytte lejligheden, til at fremsætte nogle synspunkter om det nordiske samarbejde i Nordens vestlige del, eller Vestnorden som det ofte nævnes.

I oktober 2002 nedsatte samarbejdsministrene en arbejdsgruppe som skulle lave en redegørelse over - Vest-norden i det nordiske samarbejde-. Arbejdsgruppen afleverede denne redegørelse i maj 2003.

Det er en udmærket redegørelse med mange gode analyser og betragtninger og udmærkede forslag til aktivitetsområder for samarbejde i Vest-norden og med Vest-norden i det samlede Norden.

Som vi ved, så blev redegørelsen henvist til alle fagministerråd, med ønsket om tilbagemelding om aktiviteter i Vest-norden og med Vest-norden. Selv efter to sådanne runder er det ikke helt enkelt at få øje på hvilke samarbejder, der er opstået på grund af denne redegørelse.

Den nævnte arbejdsgruppe anbefalede, at samarbejdsministrene fire år efter at redegørelsen var afleveret, det vil sige i 2007, skulle iværksætte en opfølgende overordnet vurdering af udviklingen i det nordiske samarbejde i Vestnorden og med Vest-nordens naboer.

Nu er halvdelen og mere til allerede gået af denne fire års periode, så i virkeligheden skal denne vurdering foretages om et og et halvt år.

Jeg tror ikke at det bliver ret meget at vurdere, men jeg vil ikke klandre respektive ministerråd for, at vi ikke fik de aktiviteter vi håbede på.

For mig at se er det ikke rimeligt, at vi der bor i Vest-norden, og som er politikere i Vest-norden, læner os tilbage, mens vi passivt venter på, at andre ministre i Norden skal få ideer om hvad der skal samarbejdes om i Vestnorden og med Vest-norden.

Skal redegørelsen føre til resultater, så må vi politikere, ministre, som repræsenterer for Vest-norden i det nordiske samarbejde i fremtiden være mere aktive og mere innovative, vi må selv fostre ideer til samarbejde med tydelig nordisk nytte, det er os, som må vise vores respektive kollegaer hvad Vest-norden kan byde på af samarbejdsområder hvor samarbejde kan gavne hele Norden.

Hvordan dette realistisk, relevant og dynamiskt kan udføres, det må vi ministre fra Vest-norden selv sætte gang i, vi må tage både initiativet og ansvaret for at dette bliver en succes.

Præsident

Jeg er temmelig sikker på, at om vi i Vest-norden er aktive og innovative, så vil også det samlede Norden være aktivt og innovativt i Vestnorden og med Vestnorden.